# Pedagogar

Dagstovnurin Birkilund ynskir sær 5 pedagogar at starvast millum 20 og 40 tímar um vikuna. Pedagogarstørv eru tøk í vøggustovu og barnagarði.

Størvini verða sett 01.02.2009 (ella eftir avtalu)

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Birkilund er ein sjálvsognarstovnur við 35 børnum í vøggustovuni og 74 børn í barnagarði. Vit hava 7 stovur og 3 til 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

Vit eru í eini broytingartíð, har eindirnar í summar vóru lagdar saman, vit eru í holt við at finna felags stev og vit arbeiða við at gera menningarætlaninar lidnar. Í 2009 fara vit miðvíst at arbeiða við TRAS og øll starvsfólkini skulu á skeið fyri at læra at arbeiða við TRAS.

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum náttúruríkum umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og við øllum sniðgøtunum á Konmansmýru.

**Krøvini til um tín eru m.a:**

- At tú ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði á einum dagstovni er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú ert nærverandi og dugir at lurta.
- At tú raðfestir foreldrasamstarv høgt.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum sum mál.

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Katrin Bjarnadóttir á tlf 215458 ella hjá álitisfólkunun Jóhanna Laksá tlf 313131(vøggustovan) ella Allan Mortensen tlf 257832 (barnagarðurin)

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 15.01.2009.

Tilskilast skal um tú bert ynskir at arbeiða í vøggustovu ella barnagarð.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Dagstovnurin Birkilund**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn



## Hvør vil eiga ein av okkum?

Vit eru 11 vikur gamlir, tvær tíkar og ein hundur, og vit vilja so fegin finna tey røttu fólkini at búgva hjá.

**Ring 214929 ella 319170 – Durið**

# Søkt verður eftir ekspetrisu

Søkt verður eftir tilkomnari ekspetrisu, at byrja uml. 15. jan. 2009.

Tímar: uml. 24 tímar um vikuna.

**Aldur:** 25 ár ella eldri.

Nærri upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til Sunrið Olsen, tel. 218398.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**Touché**
Áarvegur 1 · 100 Tórshavn
sh-ri@post.olivant.fo

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

## Upplatingartíðir um jólini

Stongt er millum jóla og nýggjárs. Latið verður upp aftur mánadagin 5. Januar 2009 til vanliga tíð.

**STUÐULSSTOVNURIN**
Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279 · FO - 110 Tórshavn
tlf. 356800 · telefax 356801 · t-postur: studul@studul.fo - www.studul.fo

Sp/f. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

# 3 jeepar til sølu

3 Mitsubishi Pajero jeepar til sølu. 2 av longra modellinum við setrum. 1 av styttra modellinum sum vøruvognur.

Allir bilarnir hava plátir og eru í rímiliga góðum standi.

**Minsta boð er kr. 5.000 pr. stk.**

**Tlf. 28 38 32**




## Ein svartur VW Golf 2.0 til sølu

Ger eitt gott keyp!! Her er møguligt at ognað tær ein svartan (metallak) Golf frá mai 2002.

Bilurin er í góðum standi. Er sýnaður 01. des. 2008, hevur koyrt km. 109.000 og koyrir 12.5 km/l. við sínum 115 hk.

Hann hevur nýggj Michelin summardekk og manuel gear.

Eykaútgerð: 4 airbags, ABS bremsur, startsperru, el-rútar aftan og framman, el – spegl, tráðleyst centrallás, powerstýring, fløguspælara við magasin, radio og sóltak.

Prísurin fyri hendan bilin er einans kr. 85.989, umframt skrásetingargjald.

Keypir tú bilin áðrenn 24. des verður avsláttur givin.

**Áhugaði ringið/sms'i á fartlf. 59 21 34.**

**Sí heimasíðuna www.sel.fo**

# *Jólini 2008*

*Vit ynskja limum og samstarvsfeløgum eini góð og hugnalig jól við takk fyri tað brátt farna ári við ynskjum um gott samstarv í komandi ári.*

***Føroya Handverkarafelag***

Runavíkar Kommuna

## Runavíkar Kommuna og Kunningarstovan

Kommunuskrivstovan og Kunningarstovan eru stongd millum jól og nýggjár.

Opið verður aftur mánadagin 5. januar 2009 kl. 10.00.

Umsóknir um loyvi at brenna nýggjársbál mugu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 23/12.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-600 Saltangará